# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*- Ríkiligt svass er skrivað um nationalismuna í Føroyum. Eg gleði meg til at lesa bókina hjá Anju. Saft og kraft í Patursson? Hann var eitt umvandrandi, miðaldarligt fossil.*

*Rolf Guttesen*

## Loysa upp fyri basaltknúti

Tað eru góð signal at senda umheiminum, at tað eingin forðing er longur at bora gjøgnum føroyska basaltið. Í blaðnum í dag fegnast stjórin í Jarðfeingi um, at tað gongur væl at bora gjøgnum basaltið í føroysku undirgrundini, nakað, sum bæði myndugleikar og oljufeløg annars hava sett stór spurnartekin við. At hesin ótti ikki longur er til steðar kann fáa sera hepnar avleiðingar fyri leitingina á landgrunninum sum heild. Tað fer at jarða ivan hjá mongum av stóru oljufeløgunum, sum kanska halda seg burtur nettup tí, at tey halda tjúkka føroyska basaltið verða eina forðing fyri at fara undir boriverkætlanir her um leiðir.

Vit hava leingi hoyrt, at basaltið hevur verið stóra forðingin, tá tað um leiting umrøður. Fyri tað fyrsta hevur tað verið ein trupulleiki at síggja niður gjøgnum basaltið við seismiskum kanningum. Men eisini hesin parturin tykist at vera munandi betraður, nú oljufeløgini hava tikið í brúk betri kanningarhættir og tøkni. Men her er tó enn nakað eftir fyri at koma á mál.

Vit kunnu siga, at seinastu hendingarnar verðuliga hava ella eru við til at loysa upp fyri tí annars fastbundna basaltknútinum. At rætta tøknin og røttu fyrireikingarnar nú eru við til at loysa tveir av stóru trupulleikunum, tá tað snýr seg um oljuleiting á føroyska landgrunninum, má sigast at vera eitt týdningarmikið vegamót fyri ikki at siga ein kolvelting.

Komandi vikurnar verður spennandi at fylgja skjóttmælandi borinum hjá Stena Don og ikki minst verður spennandi at frætta, nær komið verður gjøgnum basaltið og hvat er at finna undir basaltinum: vulkansk grótsløg, sum taka allar vónir frá okkum um at finna olju har - ella sediment, sum kunnu goyma oljuna.

**Sosialurin**

## Hann er frammi hvønn dag

**HERGEIR NIELSEN**
løgtingsmaður



Meginrákið undir hugsan Sambandsfloksins hesi hundrað farnu árini hevur verið, at føroyingar hvørki orka, duga ella kunna broyðføða seg sjálvar.

Vit síggja nú hendan høvuðsboðskapin ganga aftur í umrøðuni av einum politiskum søguriti frá grátigníni í Sambandsflokkinum.

Sagt verður ma., at sambandsmenn vóru meira realistiskir, meðan sjálvstýrismenn vóru droymarar.

Ikki hissini skotsmál og bert eitt dømi av mongum um, at talan er um politiska propagandu meiri enn óhefta søguskriving.

Sambandsflokkurin skal tó eiga tað á sínum høgtíðsdegi, at hann altíð hevur lagað seg eftir tí framburði, ið aðrir hava slóðað fyri, og síðani tikið hann til sín sum sín egna.

Eitt nú ganga tingmenn floksins nú himmalóðir um, at teir ikki halda flaggdagsrøður. Hvør ið so enn forðar teimum í tí.

Eisini skilst, at Sambandsflokkurin á øðrum økjum blúgvast við fortíð sína.

Hann tykist nú vera komin eftir, at ongar lærubøkur vóru á føroyskum máli fyri hundrað árum síðan, fá høvdu møguleika at fara á skúla, og tí skuldi øll frálæra vera á donskum.

Hendan søguliga grundgevingin er enn ein subjektiv umbering. Hon er ivaleyst væl hóskandi í einum proppfyltum propagandariti, men dugir ikki til at blaka burtur í søguligum samanhangi.

Rætt er, at tað stóð illa til við føroyskum frálærutilfari fyri hundrað árum síðan, men líka so rætt er, at tað stóð lutfalsliga eins illa til við donskum frálærutilfari.

Minnist til, at føroyska lesibókin hjá A.C.Evensen, sum kom út í 1911, fekk ein beint frammaná, tá løgtingið longu árið eftir samtykti, at danskt skuldi vera undirvísingarmál í Føroyum.

Úti við hundrað seinni trokaðu Heimastýrisflokkarnir so harafturat fyri fáum árum síðan føroyska málið enn longur niður eftir tignarstiganum.

Teir hildu fólkatingsmonnum sínum heima á landi, meðan danska Fólkatingið við ongum føroyskum andróðri atkvøddi føroyska málið út undir væðingina sum okkurt hissini landspartamál.

Tað er tí ikki skrásett sum sjálvstøðugt mál á jøvnum føti við onnur mál millum grannar okkara.

Politiskt hevur tað verið sera umráðandi at pota donsk virði, mál og mentan, niður í føroysk børn.

Danska uttanatslæran settist á heilaserkin á hvørjum føroyskum mansbarnið næstu hundrað árini, meðan føroyskar oyggjar, bygdir, sangir, skjaldur, mál, kvæði, mentan - og restin av heiminum - komu í aðru røð.

Danska kongarøðin, býirnar á Fjóni og Ole Bole, gik i Skole, med sin Søsters røde Kjole, voldi soleiðis mongum barni væl størri høvuðbrýggj, enn neyðugt var.

Heilt upp at okkara døgum hevur sambandspolitikkurin aksla síni skinn á ymsan hátt, og mettur av døgum kann flokkurin ikki siga annað enn, at væl hevur skorist.

Tey, ið halda, at flokkurin er einsamallur um sambandspolitikkin, fara so dyggiliga skeiv. Avleggararnir eru fleiri, og har grør tíverri um gangandi fót.

Sambandsflokkurin situr tí uppafturá á gamalsaldrinum og førir journalistina, meðan heimastýrisflokkarnir reka politikkin.

Tá móðurlandið Føroyar varð slept av hondum og endurskírt í altjóða samanhangi sum "Kongeriget Danmark for vidt angår Færøerne," kundi Sambandsflokkurin turrisliga staðfesta, at so var eisini tað málið lagt upp í rúgvuna av loystum málum.

Fyri hundrað árum síðan tóku teir land, tá teir sendu Oliver Effersøe niður at avloysa Jóannes Patursson.

Donsku ríkisdagsmenninir lýddu á og høvdu fult álit á Jóannesi Paturssyni, og donsku Vinstrumenninir boðaðu enntá frá, at teir fegnir vildu, at Jóannes Patursson, og eingin annar, varð afturvaldur.

So varð ikki. Føroyingar vildu nakað annað, og Oliver Effersøe varð valdur og slóðaði undan í einum so væl væl gjøgnumhugsaðum sambandspolitikki, at teir gomlu vinirnir vildu ikki síggja Jóannes Patursson fyri eygunum á sær aftur.

Har tann fyrri við danskari undirtøku stríddist fyri glógvandi føroyskum sjálvbjargni og framburði, knæsetti tann seinni eina nýggja gongd út í myrkur og vónloysi.

Har tann fyrri vildi frameftir, vildi tann seinni aftureftir.

Glámlýsið kom á luftina landanna millum.

"Vi færinger føle os fuldstændig som danske", "vort sindelag er dansk", "den færøske fod er ikke skikket at betræde gruslagte stier," varð fest í kyndlarnar, ið glampað hava fyri sambandinum landanna millum heilt upp at okkara døgum.

So stóran og so sterkan sigur kunna líknandi kreftir í øðrum londum ikki breggja sær av, og ikki kann sigast annað enn, at Sambandsflokkurin er ein flokkur, sum veit hvat hann vil, og sum vit vita, hvar vit hava.

Tað sama kunna vit ikki siga um hinar Heimastýrisflokkarnir, sum allir ganga í læntum spjarrum og misbrúka føroyskar sjálvstýrisveljarar til at reka danskan sambandspolitikk við.

Føðingardagsbarnið er frammi hvønn dag, og hevur bæði vit og skil.

Vit ynskja hjartaliga tilluku við teimum hundrað árunum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.